TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Kunngerð

Tað verður við hesum gjørt kunnugt, at býráðið á fundi 20. november 2003 samtykti:

- at útstykkingin eystan fyri Løgmannabreyt fær hesi gøtunøvn:

Karlamagnusarbreyt, Dýrindalsgøta, Ólivantsgøta, Huginsgøta, Karlotsgøta, Rólantsgøta, Einarsgøta, Viljormsgøta, Olgarsgøta, Bertugøta, Gortrugøta og Sivjugøta



- at útstykkingini Berjabrekka 3 fær navnið:

Blómubrekka

- at vegurin til bústaðin hjá Elini og Hjalta í Jákupsstovu undir Miðhorni í Havnardali fær navnið:

undir Miðhorni

- at broyta gøtunavnið "á Varðnípu" í Kaldbak til:

Inni á Fløtum

Í sambandi við, at vegakervið við Marknagilsvegin er umlagt, samtykti býráðið á fundi 18. desember 2003, at vegurin á traðunum hjá Jens Paula av Reyni og Magnusi Dam Jacobsen fær navnið:

undir Kerjum

SNARSKIVAN

Handilshølir

í miðbýnum í Havn til leigu.

Stødd uml. 160 m².

Bill.mrk. 212

ÚTBJÓÐING

RØKTARHEIM Í NORÐSTREYMI

Fyri »Kommunufelagsskapin í Sundalagnum« verður arbeiðið viðv. grovplanering til nýtt røktarheim í Streymnesi boðið út alment.

Arbeiðið fevnir um grovplanering og spreinging.

Roknað er við, at arbeiðið skal verða liðugt til fyrst í apríl 2004 (fyri páskir).

Útbjóðingartilfarið kann verða umbiðið nú og fæst frá mánadegi 9. februar 2004 móti kr. 5.000,00 í veð við krossaðum kekki, við at venda sær til teknistovuna hjá Albert Isfeld & Gudmund S. Hansen, arkitektar A.F.

Boð skulu saman við útbjóðingartilfarinum latast inn á teknistovuna hjá Albert Isfeld & Gudmund S. Hansen, arkitektar A.F., Lucas Debesargøta 11, Tórshavn, í afturlatnum brævbjálva merktur:

RØKTARHEIM Í NORÐSTREYMI
Tilboð og arbeiðstøka

í seinasta lagi mánadagin **16. februar 2004 kl. 16.00.**
Boðini verða tá latin upp og kunnu teir bjóðandi vera hjástaddir.

ALBERT ISFELD & GUDMUND S. HANSEN, arkitektar
Lucas Debesargøta 11, 100 Tórshavn

LANDSBYGGIFELAGIÐ, ráðgevandi verkfrøðingar
Landavegur 5, 100 Tórshavn

VERI-CON, ráðgevandi verkfrøðingar
Maritugøta 8, 188 Hoyvík

MARTIN E. LEO, ráðgevandi verkfrøðingur
Tórsgøta 24, 100 Tórshavn

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Tórshavnar kommunuskúli

varð vígdur 2. september 1956. Kommunuskúlin var tann fyrsti av teimum stóru skúlunum í Føroyum.

Í skúlanum eru allar serstovur og tvær fimleikahallir. Skúlin er klæddur uttan og er nýliga umvældur.

Í skúlanum ganga skúlaáriið 2003/04 597 næmingar í tilsamans 27 flokkum Lærararnir eru 50.

www.torshavn.fo

Skúlavørður til Kommunuskúlan

Tórshavnar kommuna søkir eftir avloysara fyri skúlavørð í Tórshavnar kommunuskúla

Arbeiðið
Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.at røkja bygningar og økið uttanum og at gera smærri umvælingar.

Førleikakrøv
Umsøkjarin skal hava handverkaraútbúgving, duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevni.

Setanarviðurskifti
Starvið er avloysarastarv í 6 mánaðir og verður sett skjótast til ber. Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Handverksmeistarafelag og Landsfelag handverkaranna.

Meiri fæst at vita
um starvið við at venda sær til Ingolv Foldbo, húsavørð, tlf. 212383, ella Eivind Danielsen, byggifrøðing, tlf. 315160.

Umsókn
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 16. februar 2004. Viðmerk á umsóknina: Skúlavørður.

Avloysari fyri granskingarhjálpara

Søkt verður eftir einum granskingarhjálpara til Føroyamálsdeildina í umleið 1/2 ár at arbeiða 3/4 tíð fyri starvsfólk í barsilsfarloyvi.

Uppgávan hjá granskingarhjálparunum er at vera hjálparfólk hjá granskarunum á deildini, haruppií at røkta søvn á deildini og annað fyrifallandi. Høvuðsuppgávan hjá avloysaranum verður at skráseta orðaseðlasavn í telduforrit.

Førleikakrøv:
Exam.art.-prógv í Norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum.
Góður teldukunnleiki.
Góð samstarvs- og tillagingarevni.

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarflokki V.

Starvið verður sett frá 1. mars ella eftir avtalu.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Turið Sigurðardóttur, deildarleiðara, turids@setur.fo

Umsóknarfreist er 16. februar 2004. Umsóknir við avritum av prógvskjølum, viðmælum o.ø. skulu sendast:

Føroyamálsdeildini
Fróðskaparsetur Føroya
V. U. Hammershaimbs gøtu 16
Postrúm 272 · 110 Tórshavn
tlf. 352520

Havnar SJÚKRAKASSI

Umboðsval

Sambært § 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til val hósdagin 25. mars 2004.

4 umboð í Tórshavnar valdømi eru uppá val.

Uppskot til umboð skulu skrivliga vera sjúkrakassanum í hendi ikki seinni enn 11. mars 2004.

Havnar Sjúkrakassi

30. januar 2004

Íbúð til sølu

Ljós 3 verilsis íbúð, umleið 75 m² á Østerbro í Keypmannahavn til sølu.

Søluprísur 1.6 mill. kr.

Ring +45 3053 8999
ella +45 4040 4637

Vegna Føroya Skiftirætt verða niðanfyristandandi ognir lýstar til sølu:

Bjarnoyarvegur 18, matr. nr. 893 aa, Tórshavn

Grundøki: 323 m².
Byggiár: 1971.
Húsini hava kjallara og miðhædd, uml. 100 m² hvør hædd.
Húsini eru innrættað soleiðis: Durur, lítil gangur, køkur, stova, 3 kømur, wc og baðirúm.
Kjallari: trappu-uppgongd, vaskirúm/fýrrúm, durur, gangur, inngongd, 3 kømur, køkur, stova og baðirúm við wc.
Urtagarður og girðing eru kring húsini.

Eldri sethús í Skopun
Matr.nr. 741, Skopun.
Grundøki: mett til uml. 280 m²
Húsini hava lágan kjallara, miðhædd og loft.
Miðhædd: stova, kamar, gangur, baðirúm, køkur.
Loft: gangur, 3 kømur (eitt er kvistur), wc.
Gjørt er rundanum húsini. Hjallur og fjós eru á stykkinum.
Húsini liggja væl fyri í gomlu bygdini við sera góðum útsýni.
Nærri upplýsingar um ognirnar fáast frá undirritaðu.
Tað stendur skiftirættinum frítt at velja millum innkomin tilboð og til ongum at taka av.

Advokatskrivstovan
Fr. Petersensgøta 9
Postboks 6
110 Tórshavn
Telefon: 311145
Telefax: 311525
e-mail: frp@jura.fo

Til sølu

Lítil persónbilur – Fiat Cinquecento, árg. 11/95, í sera góðum standi.

Lagalig fígging

FIAT BMW

Bilfríðkan
Velbastaðvegur 78
Tel. 317300 ella 217300

Stjóri til P/F Fiskaaling

Søkt verður eftir stjóra til P/F Fiskaaling.
Hevur tú hug til avbjóðingar og vilt verða við til at leggja lunnar undir at menna føroysku alivinnuna, so ert tú møguliga komandi stjórin á P/F Fiskaaling.

Viðkomandi, ið settur verður, hevur ábyrgdina av, at felagið við atliti til endamálið verður rikið undir handilsligum treytum.

Høvuðsuppgávurnar hjá P/F Fiskaaling eru:
- At gera vísindaligar royndir við aling av fiski, skeljadýrum v.m. herímillum skapa møguleikar fyri aling av nýggjum fiska- og skeljasløgum
- At gera royndir við nýggjum aliøkjum
- Við kynbótaarbeiði at bøta um alitilfar og við sølu av framleiðslum burtur úr hesum spjaða framgongdina skjótast gjørligt til vinnuna
- At reka vinnuligt virksemi innan virksemisøki felagsins

P/F Fiskaaling rekur vinnuligt virksemi innan kynbótaarbeiði við laksum og sílum, og framleiðir felagið laksa- og sílarogn.

Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur fylgjandi førleika:
- útbúgving frá hægri lærustovni
- góð leiðslu- og samstarvsevni
- royndir at standa fyri vinnuligum virksemi
- evni at seta fyriskipanir í verk
- kunnleika til fíggjarstýring
- kunnleika til alivinnuna og til lívfrøði er ein fyrimunur.

Setanartreytir
Arbeiðsstaðið er á høvuðsskrivstovuni hjá P/F Fiskaaling Við Áir. Starvið verður sett skjótast gjørligt, men vit hava møguleika at bíða nakað eftir rætta viðkomandi. Lønin verður ásett eftir nærri avtalu, í mun til útbúgving og starvsroyndir.

Vilja tygum hava nærri upplýsingar um starvið, kunnu tygum seta tygum í samband við Janet Fríðu Johannesen, nevndarformannn tlf. 212211 ella við telduposti: jj@atlanticon.fo.

Umsókn
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum, skulu sendast til Janet Fríðu Johannesen, co/Atlanticon, Bryggjubakki 4, Postboks 263, FO-110 Tórshavn, í seinasta lagi 1. mars 2004. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

P/F Fiskaaling er partafelag, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin. P/F Fiskaaling hevur virksemi Við Áir, í Nesvík, í Skopun og í Hesti. Samlaða starvsfólkatalið er 23. P/F Fiskaaling er merkt av kreppuni í alivinnuni. P/F Fiskaaling stendur fyri kynbótaarbeiði við laksi og sílum. Endamálið við kynbótaarbeiðnum er at ala fram ein friskan fisk, sum hevur best møguligar eginleikar, soleiðis at føroyska alivinnan er betur kappingarfør á altjóða marknaðinum. Arbeitt verður við at effektivisera kynbótaarbeiðið. Arbeitt verður eisini við at menna kalva og onnur nýggj fiskaslag til føroysku alivinnuna. Arbeitt verður við at menna granskingina, sum náttúrliga hoyra undir virkisøki felagsins. Meiri fæst at vita um felagið á www.fiskaaling.fo

P/f Fiskaaling
Aquaculture Research Station of the Faroes

Sosialurin
www.sosialurin.fo